# BMW nýggjan designstjóra



*Eftir 17 ár hjá BMW fer Chris Bangle at royna seg sum sjálvstøðugur bildesignari*



*Adrian van Hooydonk er nýggjur designstjóri hjá BMW í München*

Kendi amerikanski bildesignarin, 52 ára gamli Chris Bangle, sum seinastu 17 árini hevur staðið fyri designdeildini hjá BMW í München, hevur sagt nú seg úr starvi fyri at royna nakað nýtt.

Í hansara stað er komin hálendski bildesignarin Adrian van Hooydonk, sum er 44 ára gamal, og seinastu árini hevur arbeitt saman við Chris Bangle hjá BMW í München síðan 2004.

Tað var Chris Bangle sum kom við nýggja designstílinum hjá BMW, sum vit kenna í dag. Tað vóru ikki øll sum beinanvegin tóku undir við hansara designstíli, men í dag er hesin designstílur sera væl umtóktur.

Chris Bangle hevur eisini verið við til at designa aðrar bilar hjá BMW-konsernini sum t.d. Rolls-Royce og Mini. Hann fer nú at arbeiða sum sjálvstøðugur bildesignari.

mg

# Designprís fyri Opel Insignia




*Opel Insignia*




*Mark Adams designstjóri hjá General Motors í Evropa*

Designstjórin hjá General Motors í Evropa, Mark Adams, hevur fingið designprísin Designbest 2009 fyri designið á nýggja Opel Insignia.

Tað er ein dómsnevnd av altjóða motorjournalistum úr 15 londum í Evropa, sum stendur fyri Designbest prísinum á hvørjum ári. Hesaferð var príshandanin í Istanbul í Turkalandi.

Mark Adams er 47 ára gamal, og hann hevur havt ábyrgd av designinum hjá GM í Evropa á Opel høvuðskvarterinum í týska býnum Rüsselsheim síðan 1. juni 2007

Hann hevur eisini ábyrgdina av designinum hjá Vauxhall-verksmiðjuni í Stórabretalandi og hjá Saab í Svøríki.

mg